# 43. umboðsráðsfundur FKF 2011

# Formansfrágreiðing

## 1. Inngangur

Góðan dagin góðu fundarfólk og hjartaliga vælkomin til tann 43. umboðsráðsfundin hjá Føroya Kommunufelag.

Eg skal, í hesi triðju formansfrágreiðing míni í hesi setuni, greiða frá virksemi felagsins í farna ári.

Kommunuvalskeiðið er nú hálvrunnið. Tey, sum vóru vald í bý- og bygdarráðini fyri góðum tveimum árum síðani, á heysti 2008, fara at standa fyri vali aftur á heysti 2012.

Hesi tvey seinastu árini hava í stóran mun verið merkt av stóru búskaparkreppuni, sum ávirkar allan heimin. Skattainntøkurnar í kommununum hava verið víkjandi, og tað hevur havt við sær, at flestu kommunur hava táttað í, bæði viðvíkjandi íløgum og rakstri. Seinastu tíðina hava tó glottar verið at hóma. Inntøkurnar í fleiri kommunum eru vaksnar, og kommunur, sum hava verið omanfyri álíkningina í skuld, eru komnar niðurum, soleiðis at fokus nú kann setast á átrokandi íløgur á vegir, skúlar o.a.

Kommunurnar taka ein stóran part av skattinum frá borgaranum og hava ábyrgd av at nýta hendan pening, so hann kemur borgaranum til góðar. Eisini er tað kommunanna ábyrgd, saman við landinum, at halda samfelagshjólini í gongd í krepputíðum. Hetta hava kommunurnar gjørt hesi seinastu árini, tá vøksturin í samfelagnum annars hevur verið negativur. At kommunurnar hava staðið við sína ábyrgd, haldi eg, í stóran mun, hevur gjørt sítt til at minka um árinini av kreppuni her heima.

Tó so, enn er ikki sloppið. Kreppan herjar enn rundanum okkum, sjálvt um glottar eru at síggja. Stórar avbjóðingar liggja tí fyri framman hjá okkum kommunustýrislimum hesi tvey komandi árini. Tað áliggur okkum at vera garanturin hjá borgarunum, sum tryggjar bestu tænastu, og á skynsaman hátt er við til at føra lokalsamfelagið og landið ígjøgnum búskaparligu brotasjógvarnar, sum enn ikki eru avhæsaðir.

Sum altíð hevur virksemið hjá felagnum í stóran mun verið treytað av teimum ætlanum, sum landspolitiski myndugleikin hevur sett sær fyri at fremja í einari setu. Stóru og glæsiligu ætlanirnar frá landsins síðu, m.a. um kommunusamanlegging og skúlareform, tykjast tó at hava mist eitt sindur av sínum glansi seinasta árið.

Ósemjur í samgonguni, ímillum ymsu málaráðini og við kommunurnar, hava gjørt, at fleiri átrokandi mál eru seinkað.

Trupulleikin er, at málini, sum verða løgd fram, ikki byggja á politiskar semjur, men eru oftani úrslit av, at hvør landsstýrismaður arbeiðir í sjálvdrátti við egnum prestiguprojektum, sum als ikki eru fyrireikað og grundfest politiskt, hvørki í samgonguni ella í samstarv við kommunurnar.

Hetta er eingin gongd leið, og trúvirðið á politisku skipanina er sum heild eisini hareftir. Fyri kommunurnar er hetta als ikki nøktandi. Mín áheitan á politisku skipanina skal tískil vera: at mál verða vend politiskt, eisini við kommunurnar, áðrenn brasað verður út við stórum reformum, eingin semja er um. Tá, haldi eg, meira hevði fingist burturúr, um samstarv og samskipan var dagskráin, heldur enn hóttanir og kravboð.

## 2. Umskipan av kommunala geiranum

Í 2009 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at gera uppskot til kommunalreform.

Álitið frá bólkinum, sonevnda Kommunuálitið, var handað landsstýriskvinnuni í innlendismálum 1. oktober 2009.

Bólkurin kom við tilmæli um 7 kommunur, samsvarandi teimum økjum, sum løgtingslóg um kommunusamanleggingar og kommunal samstørv ásetur. Alternativið var 9 kommunur, har Vestmanna og Kvívík varð ein sjálvstøðug kommuna, og Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna somuleiðis gjørdust ein sjálvstøðug kommuna.

Bólkurin mælti til, at fyrsta stóra økið, fólkaskúlaøkið, varð lagt út 1. januar 2012 og næsta stóra økið, eldraøkið, 1. januar 2013. Harumframt viðgjørdi bólkurin eina javningarskipan, tó uttan at koma við nøkrum ítøkiligum uppskoti. Bólkurin mælti frá at innføra eina blokkskipan, millum annað við tí grundgeving, at ein blokkstuðulsskipan er avmarkandi fyri kommunala sjálvræðið.

Arbeiðsbólkurin legði í tilmælinum stóran dent á, at umskipanin var ein samlaður pakki, soleiðis at skilja, at skuldu kommunurnar skipast í størri eindir, so var fyritreytin eisini, at øki skuldu leggjast kommununum at umsita, eins og útjavningarskipan skuldi gerast.

Føroya Kommunufelag hevur alla tíðina víst á, sum nevndin eisini kom fram til, at kommunala umskipanin eigur at verða ein samlað tilgongd. Skulu kommunurnar leggjast saman í størri eindir, eiga hesar at fáa fleiri málsøki at umsita, og støða eigur at verða tikin til fíggingina av hesum málsøkjum, sum koma frá landinum.

Tá hettar er fingið upp á pláss, kann ein kommunureformur setast í verk.

Hetta var eisini boðskapurin, felagið bar luttakarunum á fundum í sonevnda kommunubólkinum, har kommunureformurin er viðgjørdur ímillum umboð fyri samgonguna. Hesin bólkur hevur havt fleiri fundir seinasta hálva árið, nakrir við luttøku frá kommununum.

Tíðliga í ár er so komið eitt útspæl frá bólkinum. Uppskotið leggur upp til sjálvbodnar kommunusamanleggingar, og at eldrarøktin verður løgd kommununum at umsita 1. januar 2013. Fólkaskúlin verður ikki lagdur út í fyrstu atløgu.

Sambært uppskotinum verður landið býtt upp í 9 kommunal øki, og samanlegging av kommunum og samstørv kunnu bert fara fram innan hesi øki. Fólkaatkvøða skal verða í hvørjari kommunu sær um samanlegging við hinar kommunurnar í økinum.

Velja kommunur ikki at leggja saman fyri 2013 verður tvungið samstarv um eldraøkið ímillum kommunurnar í hvørjum øki. Avgerðarrætturin fylgir fólkatalinum, tvs. at fólkaríkasta kommunan í økinum kemur at gera av, hvat hendir á eldraøkinum, meðan hinar eru við at gjalda.

Føroya Kommunufelag er ikki ímóti fólkaatkvøðum um samanlegging í kommununum. Kommunan er til fyri borgaran, og tí er tað eisini hesin, ið eigur at spyrjast um eitt so umráðandi mál sum samanlegging. Spurningurin er bara, hvat borgarin verður spurdur um, tá fólkaatkvøðan verður?

Útspælið frá landinum sigur onki um, hvussu eldraøkið skal skipast, tá hettar verður lagt út til kommunurnar. Ongin eldralóg er í dag, og verður eldraøkið stýrt út frá eini leysari heimild í forsorgarlógini. Tískil eigur ein eldralóg at verða gjørd. Krøvini kommunurnar skulu liva upp til, tá økið verður lagt út til kommunurnar, eiga eisini at verða kend, áðrenn fólkaatkvøður verða hildnar. Borgarin eigur at vita, hvat hann tekur støðu til, so hendan umráðandi avgerðin fyri kommununa ikki verður tikin í blindum.

Tá tað kemur til fígging av uppgávunum, sum verða lagdar kommununum at umsita, er onki útspæl frá landinum. Skal hettar skipast sum útjavning ímillum kommunur, broytt lutfall ímillum lands- og kommunuskatt ella sum blokkur frá landinum?

Hettar málið er enn ikki viðgjørt í kommunubólkinum. Felagið metir tað vera umráðandi, at hettar er væl lýst, og semja er um hettar týðandi mál, ímillum land og kommunur, áðrenn møguligar fólkaatkvøður verða hildnar.

## 3. Skúlareformurin

Í 2010 boðaði landsstýriskvinnan í mentamálum frá einum sokallaðum skúlareformi. Sambært hesum uppskotinum skuldu kommunurnar ganga saman í skúlasambond og, heilt ella lutvíst, skipa síni viðurskifti í felags skúlaøki. Tímajáttanin skuldi framyvir játtast til skúlaøkini í staðin fyri til tann einkulta skúlan.

Føroya Kommunufelag tók fult undir við ætlanunum at endurskoða bygnaðin á fólkaskúlaøkinum við tí fyri eyga at styrkja fakliga innihaldið í skúlanum og tryggja, at vit fáa sum mest burturúr fíggjarliga tilfeinginum. Men felagið metti, at uppskotið hjá Mentamálaráðnum loysti ongar trupulleikar, men heldur hinvegin, lat upp fyri hópin av ósemjum millum land og kommunur, og kommunurnar ímillum.

Ætlanin hjá Mentamálaráðnum um skúlaøkir er síðan slept, til frama fyri eitt uppskot um økt samstarv ímillum skúlar í ymsum kommunum. Uppskotið frá Mentamálaráðnum gevur møguleika at skipa sjálvboðin skúlasamstørv ímillum kommunur. Mentamálaráðið leggur upp til, at játtanin til skúlarnar ikki verður minkað, tá peningur verður spardur við at samstarva um skúlaflokkar ímillum skúlarnar. Spardi peningurin skal nýtast til at betra um fólkaskúlan á staðnum.

Felagið metir hettar vera eitt stig á rætta vegnum at skapa ein betri fólkaskúla. Kommunurnar kunnu velja, um tær vilja samstarva við aðrar um serlig flokkstig og tískil fáa tað besta burturúr, samstundis sum játtanin til fólkaskúla vónandi ikki minkar á fíggjarlógini.

At játtanin á fíggjarlógini til fólkaskúlan ikki minkar er umráðandi fyri eina slíka skipan. Verður uppskotið bert til eitt spariuppskot, verða størstu tapararnir fólkaskúlin og børnini.

## 4. Dagstovnaøkið

Spurningurin um felags leiðslu á dagstovnaøkinum er komin upp við millumbilum síðani Dagstovnalógin kom í 2000. Sum er, er ikki møguleiki fyri felags leiðslu av dagstovnum í kommununum, við støði í dagstovnalógini. Ásett er, at ein leiðari skal vera fyri hvønn stovn sær og fyri dagrøkt.

Kommunufeløgini hava í seinastuni verið í samband við Mentamálaráðið um leiðsluspurningin. Felagið metir tað meiri effektivt, um møguleiki er at seta ein leiðara fyri dagstovn og dagrøkt í kommununi ella eina felags leiðslu fyri fleiri dagstovnar hjá kommununi. Møguleikin at miðsavna leiðsluna gevur eisini fólki við góðum leiðsluevnum møguleika at koma framat og harvið vera við at vaksa um góðskuna á dagstovnaøkinum í kommununi.

## 5. Eldraøkið

Um kommunureformurin verður veruleiki, er eldraøkið fyrsta økið, ið skal leggjast út til kommunurnar at umsita í 2013. Her er neyðugt, at land og kommunur gera sær greitt, at hetta økið í framtíðini verður sera útreiðslutungt. Vit blíva alt fleiri eldri og færri yngri at lyfta eldraøkið fíggjarliga. Tí mugu kommunurnar í samband við kommunureformin krevja, at hædd verður tikin fyri hesum, tá ið fíggjarligar broytingar skulu gerast millum land og kommunur.

Í samband við núverandi býti ímillum land og kommunur á eldraøkinum, hevur felagið ígjøgnum nógv ár gjørt vart við skipanina við náttarvaktum á sambýlum. Í løtuni eru tað

kommunurnar, ið bera útreiðslurnar av náttarvaktunum, meðan tær eru starvssettar av landinum. Felagið metir ikki, at heimild er fyri hesum í forsorgarlógini. Náttarvaktirnar eru starvsfólk hjá landinum og eiga tískil at verða lønt harfrá. Kommunur í felagnum hava gjørt vart við hendan trupulleika, og í løtuni er felagið við at greiða, hvørjar rætningslinjur eiga at verða galdandi á økinum.

Føroya Kommunufelag ger eisini sítt til at fyrireika kommunurnar til yvirtøku av eldraøkinum, millum annað við luttøku í altjóða verkætlanini OLE2.

## 6. Umhvørvisøkið

Á umhvørvisøkinum hava verið fleiri átøk í 2010. Fyriuttan okkara egnu Agenda 21 stovu, sum er virkin á júst hesum økinum, hava fleiri nýggjar lógir og kunngerðir, sum viðvíkja kommununum, verið til hoyringar. Millum annað er komin ein bunkringskunngerð, ein kunngerð um taðing og harafturat ein herðing av havumhvørvisverndarlógini, har bøturnar fyri oljudálking ætlandi verða munandi hægri enn í dag.

Ein nýggj tilbúgvingarlóg verður løgd fram í tinginum í vár. Her hava kommunurnar ábyrgd av óhappum og oljudálking innan kommununa út frá eini váðameting fyri hvørja kommunu sær. Er óhappið størri, kann fáast hjálp frá grannakommunu og landstilbúgvingini. Í mun til oljudálking á sjónum er felagið í løtuni í eini tilgongd við Landsverk, at samskipa tilbúgvingarstigið ímillum land og kommunur.

Kommunurnar eru eftirlitsmyndugleiki á umhvørvisøkinum og umráðandi er, at umhvørvið verður hildið frítt fyri dálking. Tað er tí at frøast um, at kommunurnar fáa betri amboð í hondina at handhevja hetta eftirlit.

## 7. Verkætlanir

OLE2

### Verkætlanin Okkara Lív sum Eldri – íverksetan

Tvørtjóðarliga verkætlanin OLE2, hevur hálvt ár eftir at arbeiða í. Føroya Kommunufelag luttekur í partinum um NETVERK, saman við royndarkommununum úr Svøríki og Finlandi.

Endamálið er at seta ígongd tiltøk, sum hækka lívsgóðskuna hjá heimabúgvandi eldri borgarum. Uppgávan hjá kommununum er at skapa karmarnar, meðan tey eldri sjálvi skipa fyri virkseminum.

Føroysku tiltøkini eru um at skapa umstøður, har virksemi ímillum tey eldri og ímillum ættarliðini kann húsast. Tey eldri eru fús til verka og hevur samstarvið verið fyrimyndarligt.

Tíðin fram til ársskiftið hevur verið brúkt til at fyrireika og royna tey tiltøk sum skulu setast í verk í 2011. Tilsamans arbeiða umleið 40 fólk við verkætlanini, afturat sjálvbodnum arbeiði í hvørjum landi sær.

Northern Periphery Programme 2007–2013

Innovatively investing in Europe's Northern Periphery for a sustainable and prosperous future

European Union
European Regional Development Fund

**Forsight verkætlan**

Føroya Kommunufelag luttekur í verkætlanini "Vestnorden Foresight 2030 – bygdernes fremtidsvisioner", saman við millum annað íslendsku og grønlendsku kommunufeløgunum og Granskingardeplinum fyri samfelagsmenning.

Verkætlanin snýr seg um, hvussu útjaðarasamfeløg í útnorðri kunnu standa seg í mun til framtíðar avbjóðingar. Vald eru tvey lokalsamfeløg úr hvørjum av luttakaralondunum við trupulleikum, sum eru serligir fyri útjaðarasamfeløg ,við m.a. minkandi fólkatali, at tey ungu, serliga kvinnurnar, flyta burtur, at frítíðarmøguleikarnir eru smáir og ringt er at koma til og frá.

Endamálið við verkætlanini er at peika á, hvørji átøk tey lokalu, kommunur, virkir, áhugafeløg og einstaklingar kunnu gera fyri at steðga hesi óhepnu menning. Verkstaðir við lokalari luttøku hava verið í Suðuroy og Sandoy í samband við verkætlanina. Nógv spennandi er komið burturúr. Hetta fara vit at hoyra meir um á fundinum í morgin.

**Agenda 21 Stovan**

Agenda 21 Stovan hevur nú virkað í góð 7 ár, í tøttum samstarvi við Innlendismálaráðið og kommunurnar. Vit fingu nýtt starvsfólk á Agenda 21 stovuna í apríl 2010, Kára Thomsen, og hann helt fram við teim fyrireikingum settar vóru í verk til m.a. Umhvørvisátakið í 2010, ið vísir seg at mennast í hvørjum. Millum annað við eisini at fevna um onnur evni enn kendu kappingina um "Best røktu Bygd".

"Grøna Skjalið" var í desember 2009 undirskrivað av 18 kommunum, og er í ár ætlan at fáa írestandi kommunurnar, at taka undir við ætlanini um burðardygga menning.

Lokal Agenda 21 verkætlanir eru virknar í nøkrum kommunum. Norðurlendska umhvørvisætlanin fyri Toftavatn var liðug í vár og hildið verður áfram at seta í verk lokal átøk, kunning og verkætlanir til m.a. grønar stovnar og frálærutilfar innan burðardygga menning. Stovan luttekur eisini, vegna kommunurnar, á fundum og ráðstevnum innan- sum uttanlands.

Meginhugtakið er, at hugsa globalt, men handla og virka lokalt. Hettar er umráðandi fyri okkum og fyri framtíðarvánirnar hjá okkara eftirkomarum. Tað gleðir meg tí at síggja, at kommunur raðfesta arbeiðið við burðardyggari menning høgt.

**8. Fíggjarlig viðurskifti**

Seinasta vár kom landið við uppskoti um nýggja pensjónsskipan. Hendan skipan skuldi eftir ætlan setast í gildi 1. januar 2011, men er nú útsett til 2012.

Uppskotið er umfatandi, men fyri kommunurnar er fylgjan m.a. ein áheitan frá landinum um at lækka kommunuskattin. Við nýggju skipanini fara pensjónistar at gjalda skatt av allari pensjónini og ikki, sum nú, bert av einum parti. Hetta hevur við sær størri skattainntøkur til kommunurnar ígjøgnum kommunuskattin. Ætlanin er at taka tann eyka skattin, kommunurnar fáa inn av pensjónsnýskipanini, inn aftur í landskassan at fíggja m.a. pensjónirnar.

Felagið metir, sum grundregla, at pensjónir eru landsuppgáva, og kommunur ikki eiga at gjalda fyri hettar. Um landið vil draga eyka kommunuskattin inn aftur, má tryggjast, at kommunur ikki vera raktar fíggjarliga í mun til verandi støðu.

Hettar málið fara vit eisini ivaleyst at hoyra meira til í 2011.

Seinasta álopið á kommunala sjálvræðið er komið frá Fíggjarmálaráðnum. Ætlanin hjá fíggjarmálaráðharranum er at nokta kommunum, ið skylda meira enn álíkningina, at hava tøkan pening á bók. Á henda hátt er ætlanin at niðurbinda skuldartyngdu kommunurnar, soleiðis at ongin íløga verður gjørd, áðrenn goldið er niður av skuldini.

Ein hvør kommuna má hava gjaldføri fyri yvirhøvur at fungera sum kommuna. At landið á hendan hátt vil binda kommunurnar er í veruleikanum at avtaka kommunala sjálvræðið fyri hesar kommunur.  Tær eru bundnar at rinda skuld, eisini sjálvt um avtalan við teirra peningastovn sigur nakað annað.

Áskoðan felagsins er, at verandi skipan, við skuldarlofti ájavnt álíkningina, hevur riggað væl. Ongin kommuna fer at lána seg út á sjógv við hesi skipan. Soleiðis at taka fíggjarliga sjálvræðið frá kommununum mótmælir felagið uppá tað harðligasta.

## 9. Eitt kommunufelag

Eftir nýggjár hava verið fundir ímillum feløgini um stovnan av einum kommunufelag fyri allar kommunurnar. Tilgongdin, at leggja feløgini saman, steðgaði í 2010, m.a. tí bíðað varð eftir útspælinum frá landinum um kommunala geiran. Nú tykist gongd verða komin á aftur, og áhugi er í báðum feløgunum, at taka arbeiðið við samanlegging upp aftur.

Tað er lítil ivi um, at eitt felag fer at kunna veita munandi betri tænastur til limakommunurnar, enn verandi tvey feløgini megna. Við at leggja fyrisitingarnar saman verður munandi lættari hjá felagnum at taka á seg tær avbjóðingar, ið broytingarnar av kommunala geiranum koma at hava við sær.

## At enda

Vit hava sum felag og sum kommunur stórar avbjóðingar fyri framman. Tað er neyðugt, at tann broytingin, ið nú fer fram, verður væl fyrireikað, og at hon verður grundfest politiskt við einari breiðari lands- og kommunalpolitiskari semju.

Tað er umráðandi, at land og kommunur finna felags stev í fyrireikingunum til stóru bygnaðarbroytingarnar, ið skulu fara fram. Endamálið má vera at fáa eitt samfelag, ið mennist í javnvág, og har borgarar í øllum landinum hava rætt til grundleggjandi vælferðartænastur, og ikki, sum vit eru vitni til í dag, at nógv arbeiði snýr seg um at flyta smávegis útreiðslur frá einum kassa til annan.

At enda fari eg at takka stýrinum, starvsfólki á skrivstovuni og tykkum øllum fyri gott samstarv seinasta árið. Eg vóni, at tær loysnir, sum vit koma fram til á kommunala økinum komandi árini, verða okkum øllum til bata, bæði limakommununum og felagnum.

Takk fyri!

59 mál vóru skrásett í FKF journalini í 2010.




*Býti av málum á adressatar*




*Býti av málum á journal økini*

## Fundarluttøka hjá umboðum Føroya Kommunufelags

Tilsamans 232 fundar- og/ella ferðapengar vóru útgoldnir í 2010




*Býti av umboðum FKF á heiti*
*Grundað á útgoldnar fundar- og ferðaútreiðslur*




*Býti av umboðum FKF á fundarslag*
*Grundað á útgoldnar fundar- og ferðaútreiðslur*

# Umboðan Føroya Kommunufelags úteftir

| Bólkur, nevnd o.l. | Navn |
|---|---|
| AMR: Elektronisk skipan fyri heilsuverkið | Sveiney Sverrisdóttir, skr. FKF |
| AMR: Stýrið fyri serflutningsskipanina | Johan Christiansen, Leirvík |
| AMR: Ráðið fyri Brekað | Veronika Petersen , Hvannasundi |
| IMR: Landsbyggireglugerð | Jógvan K. Mørkøre, Eiði |
| IMR: Byggi- og býarskipanarnevndin, eykalimur | Oluffa Joensen, Gøta |
| IMR: Byggi- og býarskipanarnevndin, limur | Jógvan Páll Joensen, Sørvágur |
| IMR: Landsfólkayvirlitið | Anna Joensen, skr. Sjóvar kommuna |
| IMR: Kommunala umskipanarnevndin | Albert Ó. Ellefsen, Miðvági |
| IMR: Kommunala umskipanarnevndin | Hans Jákup Kallsberg, Viðareiði |
| VMR: Arbeiðsumhvørvisráðið | Johanna Olsen, Sunda kommuna |
| VMR: Demokratia | Karl A. Olsen, Vestmanna |
| VMR: Stýrið f. ALS, eykalimur | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| Toll og Skattaráðið | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| Toll og Skattaráðið, eykalimur | Julia Kass, Sjóvar kommuna |
| Hagstova Føroya, fólkateljing | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| FISK: Útbúgvingaráðið | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| MMR: Skúlin á Trøðni, skúlastýrið | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| MMR: Skúlin á Trøðni, upptøkunevnd | Hallbjørg Lamhauge, Barnaverndarstovan |
| MMR: Undirvísingarportalurin | Karl A. Olsen, Vestmanna |
| MMR: Lystaleypurin | Karl A. Olsen, Vestmanna |
| MMR: Endurskoðan av dagstovnalógini | Karl A. Olsen, Vestmanna |
| MMR: Pisa fylgibólkur | Karl A. Olsen, Vestmanna |
| MMR: Endurskoðan av dagstovnaøkinum | Karl A. Olsen, Vestmanna |
| FKF: SSP samstarvið | Johan Christiansen, Leirvík |
| FKF: Starvsfólkahandbók | Ove Høgnesen, Eysturkommuna |
| FKF: Barnaverndarstovan | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| FKF: Ráðið fyri ferðslutrygd | Susanna Sørensen, Strondum |
| FKF: Kommunala Arbeiðsgevarafelagið | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| FKF: Kommunala Arbeiðsgevarafelagið | Karl A. Olsen, Vestmanna |
| FKF: Kommunala Arbeiðsgevarafelagið | Albert Ellefsen, Sandavágur |
| FKF: KIMO stýrið | Jógvan K. Mørkøre, Eiði |